VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið mikudagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 15 og18 stig.



Veðrið hósdagin:
Fleyr til gul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

Veðrið fríggjadagin og leygardagin:
Lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.

Eitt hampiligt lundaár

Í Nólsoy lata teir hampiliga væl at lundaárinum í ár

NÓLSOY
Heri á Rógvi
heri@sosialurin.fo

Tað eru ikki tey mest jaligu lýsingarorðini, sum koma fra Kristin Holm, tá vit sita í køkinum hjá honum í Nólsoy og fregnast eftir, hvussu lundaárið hevur roynst í ár. At byrja við er tað heilt vánaligt, men tað broytist so til at at hava verið eitt hampuligt ár. Tað er hampiligt, tí tað sær út til at vera fitt av pisu til komandi ár. Men sjálvt talið av fleygaðum lunda er vánaligt.

Tá vit vitjaðu fyri einari viku síðani høvdu menn fleygað eini 5.000 lundar. Tað er so avgjørt ikki ov nógv, halda nólsoyingar. Í bestu árum vildi hetta tal verið fleiri ferðir størri. Árið í fjør hepnaðist stak illa.

Nólsoyingar taka lundar í Urðini. Tað eru oftani teir somu, sum plaga at fleyga, og alt verður fyriskipað eftir gomlum. Farið verður avstað tíðliga á morgni. Tíðliga á morgni taka menn lut um tey tólv plássini. Tann elsti tekur fyrst – og tann yngsti fær tað, sum er eftir. Tað eru tólv sessir í Urðini. Veðrið ger oftani av, nær menn venda heimaftur. Kristin Holm hevur riggað sær eina roytimaskinu til, og tískil er ikki nógv stríð av tí.

– Og so tekur konan yvir, sigur Kristin skemtandi.

Tað er ikki bara at biðja um dóttrina. Svigarsonurin Jón Dahl situr við roytimaskinuna. Tað er ólíka nógv lættari enn at royta við hond
Mynd: Heri á Rógvi

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	8
Qaqortoq	5
Ammassalik	10
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	14
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	10
Lerwick	11
Aberdeen	14
London	20
Tromsø	11
Bergen	14
Oslo	–
Stokkhólm	19
Keypmannah.	18
Helsinki	15
Moskva	20
Berlin	20
Warzawa	16
Kiev	18
Bukarest	23
Paris	25
Madrid	36
Róm	27
Malorca	30
Athen	30
Malta	30
Tunis	33
Beijing	21
New Dehli	38
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	17
New York	28
Miami	31
Los Angeles	19
Meksikobýur	20
Panama	–
La Paz	11
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	11

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 990 hPa. vestan fyri Ísland stendur í stað og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1004 hPa. vestan fyri Írland fer í útnyrðing og dýpist nakað. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týsdagin.

Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í útsynning og dýpist nakað. Brúgvalagið haðani til Føroya stendur næstan í stað.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 01/08 kl. 06⁰⁰–02/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,1°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 1,0 mm – mált frá 01/08 kl. 06⁰⁰–02/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 1,0 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin næstur jørðini
31. juli: Fullmáni
7. aug.: Seinna kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
3. aug	09.39	22.02	08.39	21.02	08.54	21.17	11.39	—	00.14	12.39	07.54	20.17	06.54	19.17	09.54	22.17	10.54	23.17	09.24	21.47	10.39	23.02
4. aug	10.25	22.46	09.25	21.46	09.40	22.01	00.02	12.25	01.02	13.25	08.40	21.01	07.40	20.01	10.40	23.01	11.40	—	10.10	22.31	11.25	23.46
5. aug	11.07	23.28	10.07	22.28	10.22	22.43	00.46	13.07	01.46	14.07	09.22	21.43	08.22	20.43	11.22	23.43	00.01	12.22	10.52	23.13	—	12.07
6. aug	11.49	—	10.49	23.24	11.04	23.39	01.28	13.49	02.28	14.49	10.04	22.39	09.04	21.39	—	12.04	00.43	13.04	11.34	—	00.28	12.49

5 707265 100029 >